# Fara at hyggja seg um

**Regin Jacobsen, stjóri í Bakkafrost Holding, heldur, at ein stórur fyrimunur við FaroExpo er, at fleiri keyparar og seljarar kunnu hittast saman dag – og undir sama taki. - Fyri okkum er hetta ikki ein stevna, har vit vænta at selja nakað. Hinvegin fara vit leita eftir ymiskum, sum vit kunnu brúka í okkara virksemi, sigur hann**

FAROEXPO 07
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Bakkafrost hevur gjøgnum nógv ár verið eitt gott og støðugt arbeiðspláss, og nógv fólk hava verið í starvi á virkinum í langar tíðir*

Bakkafrost Holding, sum hevur onnur dóttirfeløg undir sínum veingjabreiði, hevur øll árini luttikið á FaroExpo. Hetta er sostatt á triðja sinni, at felagið verður við á hesi vinnustevnu.

Regin Jacobsen, stjóri í Bakkafrost Holding, heldur, at FaroExpo er ein góður møguleiki hjá fyritøkum, sum leita eftir ymiskum veitarum til tað virksemi, sum tær hava.

- Tað er serliga í hesum sambandi, at vit eru við. Tá tú bæði hevur smoltframleiðslu, aling og virking, er tað nógv, sum tú kanst hava eyguni eftir og vilja tosa við aðrar veitar um.

## Ymiskir veitarar

Hann vísir á, at FaroExpo í fyrsta lagi er ein vinnustevna fyri veitarar av ymiskum slagi.

Og tó.

- Á FaroExpo í fjør var eisini onkur keypari av fiskavørum, men hetta er ikki tað primera á hesi stevnu.

Regin heldur, at FaroExpo er ein lutfalsliga bíligur og ómakaleysur háttur at hitta fyritøkur, ið hava tín áhuga.

- Tær nýtist ikki at dragsa nakað við tær í Ítróttarhøllina, tí skipanin við partneriati leggur upp til prát og fundarvirksemi millum áhugaðu fyritøkurnar.

Stjórin heldur, at tað er ein stórur fyrimunur, at tú á eini slíkari vinnustevnu kann hitta fleiri veitarar sama dag – og undir sama taki.

## Fleiri fundir

- Fyri okkum er hetta ikki ein stevna, har vit vænta – ella leggja okkum eftir - at selja nakað. Hinvegin fara vit leita eftir ymiskum, sum vit kunnu brúka í okkara virksemi, sigur hann. Stóra matvøruframsýningin í Brússel í mai, har vit eisini eru við, hevur eitt heilt annað søluendamál. Tá eru vit við og bjóða út okkara vørur til keyparar, sum leita eftir veitarum.

Stjórin í Bakkafrost Holding sigur, at rættiliga fitt av veitarum eru við á vinnustevnuni hesaferð, og hann ætlar at tosa við fleiri teirra.

Tá vit høvdu orð á hann seinasta hóskvøld, hevði hann ikki sæð, hvussu endaliga fundarskráin sær út, men Regin væntaði, at tey, sum umboða Bakkafrost Holding á FaroExpo, fara at hava einar 10-12 fundir við aðrar fyritøkur, sum eru við.

## Góðir fyrilestrar

Regin sigur, at undanfarnu tvær vinnustevnurnar hevur ráðstevnuparturin, sum fevnir um fyrilestrarnar í Skálafiðri, verið áhugaverdur, og hann ivast onga løtu í, at soleiðis verður aftur hesaferð.

- Øll evnini, sum teir fýra fyrilestrarhaldararnir fara at røða um, eru á hvør sín hátt áhugaverd.

Stjórin í Bakkafrost Holding sigur, at hann í nógv ár hevur fylgt við teimum hagtølum og metingum, sum høgt metta fyritøkan í Noregi, Kontali Analyser, hevur lagt fyri dagin.

Umboð fyri hesa fyritøku fer eisini at halda fyrilestur í Skálafirði.

- Kontali Analyser eru kendir í heimshøpi fyri síni hagtøl, metingar og framskrivingar, ikki minst innan fiski-og alivinnu. Í sínum fyrilestri fer Ragnar Nystøyl at tosa um evropeiskt og altjóða rák í sambandi við laks og hvítan fisk, sigur Regin.

## Keypa kunning

Hann sigur, at Kontali Analyser savna ein hóp av hagtølum kring um heimin, og fyritøkan hevur eisini neyvt samstarv við marknaðarfólk av ymiskum slagi og úr ymiskum heraðshornum. Einaferð um mánaðin kunnu hesi teirra tøl, metingar og framskrivingar keypast fyri dýran pening.

- Kontali Analyser selir soleiðis sítt arbeiði og sína kunning til aðrar at hyggja at og gera sínar egnu metingar um. Vit í Bakkafrost Holding hava soleiðis hald upp á hesa kunning, sum eisini fevnir um marknaðar- og framleiðsluhagtøl, sigur hann og leggur aftrat, at tølini hjá Kontali Analyser eru rættiliga væl dagførd.

Regin Jacobsen sigur seg vænta, at fyrilesturin hjá Ragnari Nystøyl – eins og hinir tríggir, sum eru á skránni - verður rættiliga áhugaverdur.




*Bakkafrost er eitt portiónsvirki burtur úr. Hetta er ein av framleiðslunum hjá virkinum, sum verður marknaðarførd undir navninum "Iglo"*

## FAKTA

Bakkafrost Holding er høvuðsfelag, sum hevur fýra dóttirfeløg undir sær. Tey fýra feløgini eru Faroe Salmon, sum hevur alla sjógvalingina undir hond, kryvjivirkið í Klaksvík, Faroe Salmon Processing og Bakkafrost, sum er sølufelagið.

Øll framleiðslan verður seld undir navninum Bakkafrost, og navnið er soleiðis vorðið kent á útlendska laksamarknaðinum.

Eini 160 fólk tilsamans arbeiða hjá Bakkafrost Holding og hjá dóttirfeløgunum.

# Bakkafrost tvífaldað framleiðsluorkuna



Bakkafrost á Glyvrum er bæði um-og útbygt í summar. Samstundis, sum virkisbygningurin er bygdur longur norðureftir, er alt tikið innan úr gamla virkinum, sum hevði við sjálva framleiðsluna at gera. Tá ið tilbygningurin var liðugur, varð alt sett upp aftur av nýggjum. Endamálið við um-og útbyggingini hevur verið at rationalisera og økja framleiðsluna av portiónum úr laksi.

Øll reinskering av fløkum fer nú fram við maskinum – ella "robottum", sum stjórin í Bakkafrost Holding, Regin Jacobsen, tekur til.

- Hetta kemur kortini ikki at merkja, at talið av arbeiðsfólkið verður minni, men kanska heldur størri, tí framleiðslan av portiónum verður munandi økt, leggur hann aftrat.

Bakkafrost er útbygt við 30 metrum norður úr gamla bygninginum, soleiðis at samlaða longdin suður og norður nú er 100 metrar tilsamans. Breiddin er 30 metrar.

Regin Jacobsen sigur, at útbyggingin merkir, at ein portiónslinja er sett upp aftrat, soleiðis at virkið nú hevur tvær linjur.

- Vit byrjaðu at byggja út longu í januar, men sjálv framleiðslan av portiónum hevur gingið ótarnað heilt fram til 5. juni, tá vit fóru undir at taka gamla virkið niður, sigur stjórin í Bakkafrost Holding, sum eisini veit at siga, at nøgdirnar av alifiski hjá feløgunum, ið virka undir móðirfelagnum, eisini fara at veksa.

(-vilmund)